## Serstøk møtirøð í Betesda um samkomusannleikar

Komandi tríggjar vikurnar fer Óli á Grømma Jacobsen hvørt mánakvøld og mikukvøld kl. 20 at tala um meginreglurnar í Orði Guds fyri, hvussu ein staðbundin samkoma eigur at skipa og samskipa sínar tænastur. Sum ein liður í arbeiðnum at skipa samkomuna og tað verk, sum gjørt verður í og út frá henni, hevur leiðslan í Betesda heitt á Óla á Grømma Jacobsen, trúboðara, sum dagliga virkar í leiðsluni fyri trúboðarafelagsskapin New Tribes Mission, um at koma heim at vegleiða og undirvísa í hesum spurningum.



## Samkoman á staðnum

Aðalevnið fyri øll møtini er: samkoman á staðnum ella staðbundna samkoman, har Óli, við støði í Orði Guds, fer at viðgera tær meginreglur, sum eiga at vegleiða eina samkomu í hennara skipan og samskipan av tænastunum í og út frá henni. Hesi serligu møtini verða hvørt mánakvøld og mikukvøld klokkan 20 komandi 3 vikurnar. Samkomuleiðsla – hirðatænastan. Møtini verða øll hesi kvøldini frá kl. 20:00 til 21:15, har byrjað verður við frálæruni frá Óla á Grømma Jacobsen, og síðan enda møtini við einari stuttari bønarløtu. Mikukvøldini verður drekkamuður, og vóna fyrireikararnir, at fólk eisini geva sær stundir til prát og samrøður aftaná. - Vit gleða okkum til hesi serligu møtini og eru spent at hoyra Óla tosa um hesar viðkomandi spurningar, sigur Eyðun Elttør, sum eisini vónar, at mong nýta høvið at koma til hesi serligu møtini.

# Koyrandi undir Skálafirði í 2016

**Samráðingarnar ímillum landsstýrið og nevndina fyri Skálafjarðartunnilin, ganga rættiliga væl og miðað verður eftir, at øll loyvi skulu vera fingin til vega tann fyrsta november í ár**

EYSTUROYARTUNNILIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Samráðingarnar um treytirnar fyri at nevndin fyri Skálafjarðartunnilin, skal fáa loyvi at gera undirsjóvartunnilin ímillum Streymoy og Eysturoy, ganga væl. Seint í ár skal ein endalig avtala verða klár og so kann sjálvt tunnilsarbeiði byrja í 2012*

Í 2016 verður koyrandi ígjøgnum undirsjóvartunnilin nógv umrødda undirsjóvartunnilin ímillum Streymoy og Eysturoy.

Tað vísir ein nýggj tíðarætlan, sum er løgd eftir at samráðingar hava verið ímillum landsstýrið og nevndina fyri Skálafjarðartunnilin um treytirnar, sum felagið skal lúka fyri at sleppa í holt við tunnilin.

Tær samráðingarnar hava gingið so mikið væl, at Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, nú hevur borið uppskot niðan í Løgtingið um eina rammuavtalu fyri treytirnar, sum felagið skal lúka fyri at fáa loyvi at gera tunnilin.

Umsitingin hjá Løgtinginum gjøgnumgongur nú uppskotið og er onki at finnast at orðingunum í tí, verður tað lagt fyri Løgtingið í hesi vikuni.

Annika Olsen sigur, at ætlanin við uppskotinum er at fáa Løgtingið at samtykkja nakrar karmar fyri eini komandi avtalu millum landsstýrið og tunnilsnevndina um treytirnar fyri at fara undir tunnilin.

Tað merkir, at endamálið við uppskotinum er at fáa Løgtingið at geva landsstýriskvinnuni heimild at gera eina endaliga avtalu við tunnilsfelagið, har felagið fær einkarrætt til at gera tunnilin innanfyri teir karmar, sum Løgtingið ásetir.

### Góðar samráðingar

Tá ið karmarnir eru lagdir, verður farið undir nágreiniligar samráðingarnar fyri at fáa eina endaliga avtalu í lag við tunnilsfelagið.

Fyrrenn umsitingin hjá Løgtinginum hevur góðkent uppskotið, vil landsstýriskvinnan ikki koma inn á smálutir í tí.

Men rammuavtalan snýr seg bæði um, hvussu stórt avkastið av eginpengunum skal vera, nær tunnilin skal handast landinum aftur, hvør skal hava ábyrgdin av at halda tunnilin og hvussu tað skal skipast o.s.fr.

Annika Olsen letur annars væl at samráðingum, hóast tær eru bæði umfatandi og fjøltáttaðar.

- Sjálvandi hava vit, sum umboða tær almennu Føroyar, og privata tunnilsfelagið hvør sítt útangsstøði, sum ger, at semja er ikki um fleiri viðurskifti. Men mín uppgáva er at røkja áhugamálinum hjá landinum og at tryggja áhugamálini hjá landinum og tí hevur tað stóran týdning, at loyvisavtalan verður skrúvað rætt saman, sigur Annika Olsen.

Hon sigur kortini, at samráðingarnar hava gingið so mikið væl, at hon væntar, at ein endalig semja kann verða komin undir land í vár ella tíðliga í summar.

- Eg ivist onga løtu í, at vit koma á mál, tí báðir partar hava stórt forstáilsi fyri støðuni hjá hvørjum øðrum, leggur hon afturat.

### Koyrandi í 2016

Ingi Højgaard, sum er formaður fyri tunnilsfelagið, hevur ikki so nógvar viðmerkingar til støðuna.

- Ímeðan samráðingarnar eru, hevur landsstýriskvinnan biðið okkum um ikki at umrøða máli við fjølmiðlarnar og tað eftirlíka við sjálvandi so leingi framdrift er í samráðingunum, sigur hann.

- Og framdrift er avgjørt í málinum, leggur hann afturat.

Men hann leggur afturat, at hetta er ein varði í søguni hjá undirsjóvartunlinum, at málið nú verður lagt fyri Løgtingið, so tað eru tey stak væl nøgd við.

Ingi Højgaard sigur, at í seinasta lagi 1. november hava partarnir miðað ímóti at verða endaliga lidnir við samráðingarnar um eina loyvisavtalu.

Eftir tað skal felagið brúka tvey ár at fyrireika tunnilsgerðina, so tað verður klárt at seta spakan í einaferð í 2012.

- Sjálvt tunnilsarbeiðið tekur fýra ár so gongst sum ætlað, verður koyrandi ígjøgnum Eysturoyartunnilin í 2016.

### Rundkoyring undir Skálafirði

Sum skilst á grein, sum Alfred Olsen, løgtingsmaður, hevur sent fjølmiðlunum, verður talan um ein undirsjóvartunnil við trimum koyribreytum og rundkoyring mitt undir Skálafirði. Frá rundkoyringini gongur ein tunnil vestureftir og kemur upp á Strondum og ein tunnil gongur eystureftir og kemur upp á Toftum og sostatt eru báðir armarnir á Skálafirði bundnir saman í undirsjóvartunlinum.

Frá Suðurstreymoy til rundkoyringina er tunnilin 7,1 kilometrar langur og strekkið frá rundkoyringini undir Skálafirði yvir á Strendur er 2,1 kilometrar langt og strekkið yvir á Toftir er 1,8 kilometur langt.

# Tað almenna virðir ikki javnstøðu

**Menn fáa 16,3 prosent meira í løn enn kvinnur, og verður hædd tikin fyri útbúgving, starvsetan, aldri og øðrum, so er munurin kortini 2,9 prosent í miðal. Tað staðfestir ein kanning, sum Hagstova Føroya hevur gjørt fyri Javnstøðunevndina um lønarviðurskifti á almenna arbeiðsmarknaðinum**

JAVNSTØÐA

*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Tað almenna ger mismun í javnstøðuspurninginum. Tað er í øllum førum niðurstøðan hjá Hagstovu Føroya, og kanningini, sum Javnstøðunevndin hevur umbiðið.

Menn fáa 16,3 prosent í meira í ráari løn enn kvinnur, og verður hædd tikið fyri aldur, starv, útbúgving og øðrum faktorum, so fáa menn kortini í miðal 2,9 prosent meira í løn, fyri sama arbeiði, sum kvinnur.

- Tað er als ikki nøktandi, at munurin er heili 16,3 prosent, sigur Kristianna Winther Poulsen, forkvinna í Javnstøðunevndini, sum ætlar at nýta hesa kanning at fáa tiltøk sett í verk soleiðis, at kvinnur kunnu fáa somu løn sum menn á almenna arbeiðsmarknaðinum.

### Børn gera ongan mun

Meðan kanningin vísur, at menn eru betri løntir enn kvinnur, so vísur kanningin eisini, at kvinnur við børnum fáa somu sømdir, sum kvinnur uttan børn.

- Tað undrar meg eitt sindur. Eg kundi ímyndað mær, at lønirnar hjá kvinnunum blivu ávirkaðar av, at tær vóru í barnsburðarfarloyvi, sigur Kristianna Winther Poulsen, sum vísir á, at føroyskar kvinnur fáa í miðal fleiri børn enn kvinnurnar í grannalondunum.

Hóast staðfest verður, at kvinnur við børnum ikki fáa verri lønarsømdir enn kvinnur uttan børn, so samanber kanningin ikki lønarviðurskiftini hjá kvinnum við børnum og monnum við børnum.

- Kanningin staðfestir bara munin millum kvinnur við børnum og uttan børn, og ikki hvørt munur er millum menn við børnum og kvinnum við børnum, sigur Jón Joensen, ið hevur staðið á odda fyri kanningini, sum Hagstova Føroya hevur gjørt.



*Forkvinnan í Javnstøðunevndini er bilsin um at børn onga ávirkan hava á lønarlagið hjá kvinnum*